# Fyrsta stigið út í alheimin

**– Hesin nýggi sáttmálin við Ísland letur upp fyri heilt nýggjum møguleikum fyri føroyskt vinnulív. Hetta er samstundis okkara fyrsta veruliga stig út í alheimsgerðina, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður um Hoyvíkssáttmálan**

SAMSTARV
*Snorri Brend*



**Hoyvíks-sáttmálin:** Seinnapartin mikudagin skrivaðu Jóannes Eidesgaard og íslendski uttanríkisráðharrin, Davíð Oddsson undir eina samstarvsavtalu millum londini bæði. Henda avtalan fer í roynd og veru at gera Føroyar og Ísland til EITT búskaparøki.

Sambært avtaluni skal nú ferð koma á tey búskaparligu viðurskiftini millum londini, eins og ein hevur fingið eitt amboð at samskipa búskaparligu menningina.

Avtalan er sett so sterkt upp, at allar forðingar, sum kunnu tarna hesum búskaparligu viðurskiftunum, skulu beinast burtur í framtíðini. Tað verða haraftrat sett bann fyri mismuni vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna.

– Jú, hetta er ein søgulig løta fyri okkum, nú vit eru vorðin ein størri partur av alheiminum.

– Íslendingar eru komnir rættiliga langt á hesi leiðini. Og teimum kunnu vit læra av og hava teir sum okkara fyrimynd, segði Jóannes Eidesgaard, tá sáttmálin var undirskrivaður.

Sáttmálin varð undirskrivaður í hølunum hjá Fornminnissavninum í Brekkutúni í Hoyvík. Og eftir hesum fekk hann eisini navn sítt – Hoyvíks-sáttmálin.

Øll viðurskifti viðvíkjandi samstarvinum innan fiskivinnuna eru ikki greidd enn. Hetta fer at taka sína tíð, men ein loysn verður eisini funnin á hesum spurninginum.

### Byggir á álit

Henda avtalan fer at verða til fyrimunar fyri føroyingar. Men eisini íslendingar síggja stórar møguleikar í samstarvinum við føroyingar í framtíðini.

Davíð Oddsson segði eftir undirskrivingina, at tá Einahandilin varð avtikin í 1856, so var tað ein stórhending fyri føroyska samfelagið. Henda avtalan er gjørd eftir sama leisti, og fer uttan iva at gerast eitt tíðarskifti á tveimum økjum.

Í fyrsta lagi kunnu londini bæði nú vera við til eitt størri búskaparligt samstarv, og í øðrum lagi er hetta tann breiðasta og mest opna handilsavtalan, sum íslendingar nakrantíð hava gjørt – og føroyingar við!

– Hetta er ein góð avtala. Her er ikki neyðugt við eftirliti av øðrum hægri myndugleika, tí henda avtalan byggir snøgt sagt á álit millum báðar partar.

– Hetta er ein góður dagur fyri føroyingar og eisini ein góður dagur fyri okkum íslendingar, sigur Davíð Oddsson.

Í fyrstu syftu er her talan um samstarv millum hesi bæði londini. Men tað verður ikki útilokað at ikki eisini Grønland kann koma við í hetta samstarvið einaferð í framtíðini.

*Davíð Oddsson og Jóannes Eidesgaard hava júst undirskrivað Hoyvíks-sáttmálan sum verður til fyrimunar fyri bæði londini*

*Mynd :Jens Kr. Vang*

# Møguleikar í framtíðini

**– Okkara áhugamál verða betri viðfarin við fríum handli enn í eini innilokaðari europeiskari tollunión, sigur Davíð Oddsson**

SAMSTARV
*Snorri Brend*

Seinnapartin mikudag var hildin ráðstevna um vinnumál í Norðurlandahúsinum, har íslendski uttanríkisráðharrin, Davíð Oddsson eisini helt talu.

Hann greiddi her eitt sindur frá vinnuligu viðurskiftunum í Íslandi, sum hevur havt eitt fíggjarligt, mentanarligt og lutvíst eisini politiskt samstarv við ES-londini gjøgnum EBS-avtaluna.

Her hava tey somu handilsrættindi sum 27 onnur europeisk lond og hava atgongd til eitt marknaðarøki sum fevnir um 500 mió. menniskju.

### Betri uttanfyri

Fyri íslendingar er eingin um, at EBS framvegis fer at verða eitt trygt grundarlag fyri sambandi og handli Íslands við Europa.

– Tað eru nógvar orsøkir til at vit so staðiliga hava hildið okkum uttanfyri ES. Ein orsøk er, at vit meta okkara áhugamál verða betri viðfarin við fríum handli við flest møgulig lond kring heimin, enn at verða innilokað í eini felags-europeiskari tollunión, segði íslendski uttanríkisráðharrin.

Hann vísti á, at luttøka teirra í EFTA hevur verið til fyrimunar fyri landið. EFTA hevur fyri stuttum gjørt fríhandilsavtalur við 14 lond, sum ikki eru við í ES.

– Í EFTA tosar ein í løtuni um at gera avtalu við Suðurafrika og onnur lond í hesum heimspartinum. Og í heyst verður ein avtala við Suðurkorea undirskrivað.

– Tað átti tí ikki at komið óvart á, at stór lond ofta ynskja at gera fríhandilsavtalur við EFTA-londini, tí tey standa fyri umleið 2 prosentum av heimshandlinum. Hetta svarar nøkurlunda til sama tal, sum Mexico ger við sínum 100 mió. íbúgvum, vísti Oddsson m.a. á.

## Havnaøkini verða nógv nýtt



*Nógv virksemi er hjá O.C. Joensen á Oyri. Nú skal eisini ein móttøkustøð gerast her*

*Mynd: Sunda kommuna*

**Sunda kommuna:** Á seinasta bygdaráðsfundi í kommununi vóru ikki færri enn tríggjar umsóknir um leigu ella keyp av lendi, sum liggja uppat sjóvinnu í hesi samanløgdu kommununi.

Eitt uppskot var frá Pan Fish um at leiga eitt lendi og bryggjukant í Haldórsvík.

Eitt annað uppskot var frá O. C. Joensen um leigu av lendi til móttøkustøð og innhegning til reiðskap. Ætlanin er her m.a. at seta upp eitt størri tjald sum móttøkustøð.

Og eitt triðja uppskot var um keyp av lendi á Norðskála. Her er ætlanin at keypa tvey øki, uppá ávikavist 1130 og 146 fermetrar, sum í framtíðini skulu nýtast til havnaøki.

Øll hesi uppskotini vórðu einmælt samtykt á bygdaráðsfundinum í farnu viku.

**sb.**

## Skúli framleiðir sólorku

**Vestmanna:** Nógv orka verður framleidd í bygdini í hesum døgum.

Her verður bæði framleidd el-orka hjá SEV og orka frá vindmyllunum hjá Røkt. Og mín sann um ikki Vestmanna skúli eisini er farin at framleiða orku úr sólini.

Henda sólorkuskipanin sum Vestmanna Kommuna og SEV hava staðið fyri er nú farin at framleiða elorku.

Hetta er ein royndarverkætlan, sum skal vísa, hvussu nógv ein slík skipan kann framleiða, í mun til hvussu veður og dagsljós er.

Ætlanin er at øll skulu kunna síggja á alnótini, hvussu nógv skipanin framleiðir. Og tey fyrstu úrslitini eru nú klár.

Í august mánaði hevur nevniliga henda sólorkuskipanin framleitt umleið 600 Kwh, skrivar heimasíðan hjá Vestmanna kommunu.

**sb.**

## Minni fiskur av landinum

**Útflutningur:** Hagtøl hjá Hagstovuni vísa, at útflutningurin av fiski fimm teir fyrstu mánaðirnar av árinum var heldur minni enn um somu tíð í fjør: Í ár eru útflutt fyri góðar 1.451 mió. ímóti 1.682 í fjør. Hetta er ein munur uppá 230 mió.

– Fyrivarni skal takast fyri, at allur útflutningurin av t.d. uppisjóvarfiski helst ikki er skrásettur enn, sigur Hagstovan. Men mett verður kortini ikki, at hetta fer at ávirka stórvegis.

Hagtølini vísa, at verða skip og aðrar vørur tiknar frá, so er munurin ikki so stórur: Í fjør vórðu skip útflutt fyri 150 mió., meðan talið í ár einans er 40.

Samanlagt gevur alt hetta tí eina minking í útflutninginum uppá 117 mió. kr.

**sb.**